Búskapur og vinna:

## Oljufeløg vísa minkandi áhuga

Tað vakti ans í Noregi, at tvey av heimsins størstu oljufeløgum sendu ikki myndugleikunum umsókn, tá tað 17. norska útbjóðingarumfarið var fyri fjúrtan døgum síðani. Tey bæði feløgini, sum ikki lótu frætta frá sær, vóru Esso og TotalFinaElf, men sambært oljumálaráðnum hava feløgini boðað frá, at tey ætla sær at søkja næstu ferð.

Norski oljumálaráðharrin, Einar Steensnæs, ásannar, at áhugin fyri teimum norsku oljuleiðunum er minkaður, men hann vónar, at okkurt av teimum loyvunum, sum vórðu útlutað í 17. umfarinum, fer at geva úrslit, so áhugin kann veksa aftur.

Higartil hava norðmenn havt eitt útbjóðingarumfar um árið, men nú verður umhugsað at broyta skipanina, soleiðis at feløg kunnu fáa loyvi uttan um tey vanligu útbjóðingarumførini.

## Gongst illa hjá Canal Digital

Canal Digital hevur mist nógvar pengar á norðurlendska sjónvarpsmarknaðinum seinastu árini, og líkt er til, at HM-fótbólturin gerst felagnum dýrur.

Canal Digital vil ikki siga, hvussu nógvir norðurlendingar sita og hyggja at fótbólti úr Japan og Korea, men felagið ásannar, at hyggjaratalið er munandi minni, enn roknað varð við, tá felagið útvegaði sær sendirættindini. Sambært felagnum kemst tann lutfalsliga lítli áhugin av, at teir flestu dystirnir eru um morgunin, og tá hava tey flestu ikki møguleika at hyggja.

Norskir fjølmiðlar halda, at Canal Digital hevur mist næstan eina milliard krónur í Norðurlondum tey bæði seinastu árini. Í hesum sama tíðarskeiði hevur umsetningurin hjá felagnum á norðurlendska marknaðinum verið tríggjar milliardir krónur.

UTTAN ÚR HEIMI

# Fleiri vesturlendingar í al-Qaeda

**Tíðindi vilja vera við, at fleiri vesturlendskir limir í felagsskapinum al-Qaeda eru tiknir á markinum millum Afghanistan og Pakistan. Teirra millum eru fleiri amerikanarar**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Amerikansku myndugleikarnir váttaðu í gjár, at fleiri vesturlendingar, sum eru limir í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, eru tiknir á marknaleiðini millum Afghanistan og Pakistan. Sambært blaðnum The New York Times eru fleiri teirra amerikanarar, men tað vildu myndugleikarnir hvørki vátta ella avsanna.

Pakistanskar fregnartænastukeldur søgdu hósdagin, at amerikanarin Jose Padilla, sum varð tikin í Chicago tann 8. mai, varí einum miðasiatiskum landi í apríl. Ørindi hansara vóru at fáa fatur á geiðslavirknum evnum, men keldurnar søgdu einki um, hvar Jose Padilla var, ella hvønn hann hevði samband við.

Jose Padilla er bert ein av fleiri vesturlendingum, sum hava verið uppi í al-Qaeda. Bretin Richard Reid varð tikin í einum flogfari á veg um Atlantshavið í desember, og amerikanarin John Walker Lindh varð tikin, tá hann bardist saman við Taliban í Afghanistan.


*Bretin Richard Reed er ein av vesturlendsku limunum í al-Qaeda. Hann varð tikin umborð á einum flogfari í desember. Tað vísti seg, at hann hevði spreingievni í øðrum skónum*

The New York Times skrivaði í gjár, at hesir tríggir eru uttan iva bert tað ovasta av ísfjallinum. Pakistansku myndugleikarnir hava sagt, atteir hava tikið umleið 400 fólk, sum teir halda hava samband við al-Qaeda, og at 300 teirra eru latnir amerikansku myndugleikunum. Sambært pakistansku myndugleikunum eru fleiri teirra vesturlendingar, og sagt verður, at í hvussu er seks av fangunum eru seinni fluttir til USA. Tveir av monnunum skulu hava verið hjálparmenn hjá Jose Padilla, og sambært tíðindastovuni AP eru teir nú til avhoyringar hjá FBI á einum loyniligum staði.

Amerikansku myndugleikarnir ivast ikki í, at Jose Padilla kom upp í al-Qaeda, meðan hann sat í fongsli í USA fyri nøkrum árum síðani. Tí halda teir, at felagsskapurin hevur verið virkin í USA og útvegað sær limir í fongslum og aðrastaðni.

# Heitasti ársfjórðingurin í 150 ár

**Meðalhitin á Jørðini hevur ongantíð verið so høgur sum tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í ár – í hvussu er ikki tey seinastu 150 árini**

UMHVØRVI
*Árni Joensen:*

Tað hevur ongantíð verið so heitt á Jørðini sum tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í ár. Kanska er tað ikki rætt at nýta orðið ongantíð, men síðani menn fóru undir at skráseta hitan fyri 150 árum síðani, hevur meðalhitin á Jørðini ongantíð verið so høgur sum í fyrsta ársfjórðingi í ár.

Veðurfrøðingar nýta tíðarskeiðið frá 1961 til 1990 sum samanberingargrundarlag, og í januar, februar í mars í ár var meðalhitin 0,7 stig oman fyri meðalhitan tey 30 árini. Hetta vísa mátingar, sum East Anglia University í Norwich í Onglandi hevur gjørt.

Granskingarleiðarin á donsku veðurstovuni Danmarks Meteorologiske Institut, Eigil Kaas, sigur, at hóast tað ikki ber til at prógva tað, er lítil ivi um, at tað er tað mannaskapta vakstrarhúsárinið, sum er orsøkin til tann veksandi hitan á Jørðini. Høvuðsorsøkin er, at dálkingin frá kol-, gass- og oljubrenning forðar hitanum frá sólini at sleppa av aftur Jørðini, sigur Eigil Kaas.

1998 er tað higartil heitasta árið, sum vísindin veit um at siga. Tað árið var hitin 0,58 stig oman fyri meðalhitan. Í fjør var hann 0,44 stig omanfyri. Men verða teir seinastu tríggir ársfjórðingarnir í ár líka heitir sum tann fyrsti, verður árið í ár nýtt metár.

Úr Norðurlondum:

## Longri fongsulsrevsing

Norska løgmálaráðið mælir til, at tann harðasta fongsulsrevsingin, sum sambært galdandi lóg er 21 ár, verður longd til 30 ár. Ein nevnd, sum hevur kannað viðurskiftini, mælti annars frá at broyta verandi mark.

Men løgmálaráðið heldur, at tað er rætt at herða fongsulsrevsingina í serliga grovum lógarbrotum. Løgmálaráðið sigur, at tá talan er um vanligt morð, er rætt at varðveita markið upp á 21 ár, men er talan um t. d. neyðtøku og morð, kann revsingin leingjast upp í 30 ár. Tað sama eigur at galda, um sami persónur verður dømdur fyri meiri enn eitt morð, sigur løgmalaráðið.

## Eisini í Danmark

Tað er ikki bert í USA, at børn og ung eru fyri kynsligum ágangi í kirkjuligum høpi. Hóskvøldið visti danska sjónvarpið at siga, at tað finnast fleiri dømi um tilsvarndi ágang í Danmark. Sagt varð, at fleiri ung hava verið fyri ágangi í sambandi við kirkjuligar samkomur og konfirmatiónsfyrieiking. Hildið verður, at bert ein lítil partur av tilburðunum verða fráboðaðir.

## Allir afturgongd

Teir fýra flokkarnr, sum mynda norsku samgongustjórnina, noyðast at ásanna, at tað kostar at sita í stjórn. Ein nýggj veljarakanning vísir, at allir flokkarnir hava afturgongd. Størsti flokkurin í samgonguni, Høgri, fær nú stuðul frá 18,4 prosentum av veljarunum, og tað er 1,8 prosent minni enn fyri bert einum mánað síðani. Uppaftur verri er hjá Kristiliga Fólkaflokkinum hjá Kjeld Magne Bondevik, forsætisráðharra. Hann fær nú 8,8 prosent, og tað er 3,7 prosentstig minni enn á valinum seinasta heyst.

Vikuskifti

Nr. 112 • leygardagur • 15. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Rógvi tekur myndir fyri Margrethu drotning

Sjálvur annar er vágbingurin og súkklarin Rógvi Johansen, sum er undir útbúgving sum fotografur, í holt við at taka myndir til myndasavn til donsku drotningina Lesið síðu 3





# – Eg vil mínum harra prísa

**Soleiðis syngur nýggja klokkuspælið í Havnar Kirkju. Tað gamla klokkuspælið, sum sang »Tíðin rennur sum streymur í á«, stendur framvegis upp í torninum, og har verður tað standandi fyribils**

KLOKKUSPÆL
*Orð og myndir: Eirikur Lindenskov*

Tá ið Havnar Kirkja í 1988 fylti 200 ár, fekk kirkjan nýtt klokkuspæl frá Havnar Kommunu. Hetta klokkuspæl skuldi loysa av gamla klokkuspælið, ið kirkjan fekk sum gávu frá nótafelagnum, sum varð avtikið fyrst í fimmtiárunum.

Tá ognir felagsins vórðu seldar, var peningurin nýttur sum gáva til klokkuspælið til kirkjuna.

Og tað var sjálvandi ikki av tilvild, tí gamalt var, at nótirnar hjá Nótafelagnum vórðu goymdar á kirkjuloftinum.

Tað var Niels L. Arge, ursmiðjur, sum hevði um hendi klokkuspælið. Hann setti tað upp og helt tað við líka, til hann fall frá fyrrapartin í sjeytiárunum. Tá tók sonur hansara, Tummas Arge, yvir hetta arbeiðið, til klokkuspælið varð skift út í 1988.

Gamla klokkuspælið, sum Chr. Ørnholms Eft. hava latið í 1952 var mekaniskt, og tað spældi bara tann eina sálmin: »Tíðin rennur sum streymur í á«, við lagnum hjá Jógvani Waagstein.

Nýggja klokkuspælið er elektroniskt og hevur fleiri løg – og eru tey at hoyra seks ferðir um dagin:

Kl 9.00: Eg vil mínum Harra prísa, (Gamalt føroyskt sálmalag). Kl 12.00: Tíðin rennur sum streymur í á (J. Waagstein). Kl 15.00: Harra Gud, títt dýra navn og æra (Gamalt føroyskt sálmalag. Kl 18.00: Kirkjan, hon er eitt gamalt hús (Knút Olsen). Kl 20.00: Dagurin aftnar, ver okkum hjá (H. J. Højgaard). Kl 21.00: Nú aftnar dagur, og tað verður síðla (Pauli í Sandagerði).

Í hesum døgum eru menn frá Byggifelagnum Waagstein í ferð við at leggja nýtt skifertak á kirkjuna undir leiðslu av Essa Ellefsen – og vórðu fyrstu steinarnir lagdir á hósdagin. Í hesum sambandinum hevur ætlanin verið at taka niður gamla klokkuspælið, sum enn stendur uppi í kirkjutorninum.

Klokkuspælið hevur ikki fornfrøðiligan áhuga – tað er ikki meira enn hálvthundrað ára gamalt, men fyri fleiri havnarborgarar vekir tað serlig minni.

Kirkjuráðið hevur umrøtt spurningin, og fleiri tankar vóru um, hvat gerast skuldi við gamla klokkuspælið. Nú er so gjørt av, at klokkuspælið fyribils verður standandi. Støða verður so tikin, tá kirkjutornið verður umvælt, ætlandi í komandi ári.

Tað er Jórun í Dali, arkitektur, sum hevur staðið fyri umvælingararbeiðinum, sum er gjørt í Havnar kirkju seinastu 8-9 árini. Hon sigur, at kirkjan nú er høvuðsumvæld øll sum hon, enn vantar bert tornið. Arbeiðið er gjørt í stigum, so sum fíggjarvánirnar hava verið.

Hvørjum standi tornið er í, veit hon ikki rættuliga at siga, tí tað hevur dupultan klædning, og tað skapar altíð trupulleikar, tí tá fær vætan ikki sett frá.

Arbeiðið sum nú er í gongd, hevur gingið væl, og tað verður liðugt fyri ólavsøku.


*Mekaniska klokkuspælið frá 1952 verður fyribils standandi uppi í torninum í Havnar Kirkju, hóast tað ikki hevur verið brúkt seinastu 14 árini*